## Minningarhald

Í morgin skipar Klaksvíkar kommuna fyri minningarhald teirra sjólátnu við minnisvarðan. Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri, bjóðar vælkomin, Niels Pauli Danielsen, sóknarprestur, talar, og Betesda-kórið fer at syngja. Felagssangur verður eisini. Umboð fyri Klaksvíkar býráð, landsstýrið, Klaksvíkar Útróðrarfelag, Klaksvíkar Arbeiðsmannafelag og Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag leggja krans við minnisvarðan.

## Heystmóti í Havn

Tann árliga heystmótasýningin hjá miðbýnum í Havn verður hóskvøldið 2. november klokkan19 í nýumvælda Hotel Tórshavn. Har fara handlarnir Niels Arge, Bamsan og Total, Diva, Fljóðið, Fótbúni, Gloss, Kallkyn, Kissa, Listir, Mótaskálin, Skálabúðin, Touché, Vogue og Wrangler Shop at sýna tey nýggjastu heystklæðini, og Salong Tóta fer at vísa hármóta. Atgongumerkini til mótasýningina eru at fáa í Kunningarstovuni.

# í okkara fólki



*Bjørn Kalsø, sum er løgmaður, nú Jóannes Ejdesgaard er burturstaddur, legði kransin við minninvarðan í Viðarlundini í góðveðrinum í morgun*

Mynd: Jens Kr. Vang

Bjørn Kalsø vísti á, at tað eru tvey almenn støð, hagar vit kunnu leita at minnast tey farnu og vísa teimum heiðum. Hetta er við minnisvarðar og kirkjugarðar.

- Sum tigandi vitni standa minnisvarðar og kirkjugarðar í bygd og bý - á nesi og á tanga. Vit høgga nøvnini á okkara kæru í minnisvarðan og gravsteinin. Tað, sum longu er høgt í minnið okkara, avmyndast í grótinum. Tað stendur eftir tann farna, og tað fer at standa eftir okkum við, segði hann.

Hann vísti eisini á, at tilfar landsins í botn og grund er tann óvikandi kletturin.

- Drangurin og kletturin eru tað grótið, ið stendur eftir, tá ið alt annað rapar. Tað er tá, at dygdin vísir seg. Gravsteinurin á landi og drangurin í sjónum standa sum minnisvarðar um dýran farm í skipahersins landi.

Løgmaður segði eisini, at júst hesa mynd nýtir próst Dahl í týðing síni, "Klettur klovin fyri mær, lat meg fáa lívd hjá tær... "

- Gudstrúgvin í fólki okkara er dýrur farmur at hava umborð. Hon er tann ævigi kletturin, har sjómaðurin fekk lívd, sjómanskonan vón og næstringar ugga. Tað er á hesa klettagrund, vit byggja land.

### Tríggir farnir

- Tað tykist vera so, segði løgmaður, at nærum á hvørjum ári fer burtur av okkara dýra farmi. Í farna ári eru tríggir landsmenn farnir á sjónum. Vit hava samkenslu við tykkum, sum stóðu teimum næst og kenna sviðan meinast.

At enda í røðu síni heitti Bjørn Kalsø á øll, sum samankomin vóru, um at reisast og í tøgn veita teimum, sum farnir eru, tann seinasta heiðurin.

Síðan las hann upp nøvnini á teimum, sum deyðir eru á sjónum seinasta ári.

Teir eru:

**Hans David Petersen, Viðareiði,** 23 ár. Druknaði 12. november 2005 við Norðborg í Klaksvík.

**Kartin Reynheim, Tórshavn,** 56 ár. Druknaði 13. september 2006 við bryggjuna í Havn.

**Mass Ingi Jensen, Nólsoy,** 51 ár. Druknaði 14. september 2006 við "Hvalnes" í Nólsoyarfirði á ferð til Havnar.



*Bjarni Bæk, dómpróstur, segði á Hotel Tórshavn í morgun, at trúgvin á Guð á einum degi sum hesum hjálpir okkum at síggja tann broytta veruleikan í eyguni*

Mynd: Vilmund Jacobsen

# Frímerkir og Trøllapætur í Miðlahúsinum

**Hósdagin 2. november skipar Pf. Postverk Føroya fyri einum áhugaverdum tiltaki í Miðlahúsinum í Vágsbotni í sambandi við útgávur av árbók, ársmappu og jólamerkjum. M.a. koma Trøllapætur og omman á vitjan**

ÚTGÁVUDAGUR

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Mikudagin 1. november er útgávudagur hjá Frímerkjadeildini hjá Pf. Postverki Føroya, tá árbókin, ársmappan og jólamerkini verða givin út og eru til keyps á posthúsunum kring landið

Í sambandi við almenna útgávudagin fyri jólamerkini verður opið hús fyri almenninginum í Miðlahúsinum í Vágsbotni hósdagin 2. november frá kl. 15-18 har Pf. Postverk Føroya bjóðar kaffi og køkur og formaðurin í Jólamerkjagrunninum greiðir frá. Frá kl. 16 eiga børnini tiltakið, tá Trøllapætur og omman koma á vitjan.

Frá Postverkinum verður sagt, at øll eru hjartaliga vælkomin.




